Fleiri rásir - einki roks

# Poltergeist

**Á Kanal 5 í kvøld kl. 20.00**

Amerikanskur virðisløntur ræðufilmur frá 1982

Við - Craig T. Nelson: Steve. JoBeth Williams: Diane. Heather O'Rouke: Carol Anne. Oliver Robins: Robbie. Dominique Dunne: Dana. Beatrice Straight: Dr. Lesh. Zelda Rubinstein: Tangina.

Leikstjórn: Tobe Hooper.



*Lítla Carol Anne kemur fyrst í samband við teir duldarfullu andarnar*



*Steve og Diane eru noydd at biðja um hjálp frá professionellum, tá dóttir teirra brádliga hvørvur og heim teirra verður ógvusliga órógva av duldarfullum kreftum*

Freeling familjan er sum flest allar aðrar amerikanskar familjur. Tey búgva í einum lítlum forstaðarøki í Kalifornia. Steve og Diane Freeling eita hjúnini. Tey hava trý børn: Diana, Robbie og Carol Anne. Brádliga tað eina kvøldið hoyrir tann yngsta dóttirin, Carol Anne, duldarfullar røddir, ið royna at fáa samband við hana. Røddirnar koma úr sjónvarpinum í stovuni hjá Freeling familjuni. Og aftaná stutta tíð, so er heimið hertikið av spøkilsum, ið spæla við børnini. Men við eitt, so verða spøkilsini alt meiri illsintari og ræðandi. Eitt kvøldið hóttir ein risastór meldurødn húsið, og klatritræið í havanum roynir at svølgja Robbie. Og meðan Diane og Steve stríðast við at bjarga Robbie, so hvørvur Carol Anne. Tey í húsinum hoyra hana gráta, men tey finna hana ikki. Steve og Diane biðja um hjálp fra tveimum professionellum parapsykologum - dr. Lesh og tí eksentrisku eksorsistkvinnuni, Tangina. Fyri at bjarga Carol Anne ferðast hesi bæði inn í ein ræðandi heim.

**Á NRK1 týskvøldið kl. 20.10**

# Heftig og Begejstret: På sangens vinger – Berlevågs manskór í USA

Eftir at manskórið úr lítlu norðurnorsku bygdini Berlevåg av álvara gjørdist kent við filminum "Heftig og begeistret", fekk kórið í boðið at koma til USA á konsertferð. Hetta var á heysti í 2001. Leikstjórin Knut Erik Jensen fór við, so nú er møguleiki aftur at síggja hetta væl dámda manskór syngja. Teir syngja m.a. á Ground Zero í New York og saman við amerikanarum, ið eru ættaðir úr Noreg. Hóast ræðuligu yvirgangsatsóknirnar vóru á World Trade Center hin 11. september í 2001, so setti kórið sær fyri at gera ætlaða túrin yvir um Atlantshavið hetta heystið. Teir 30 sangararnir komu til New York einans tríggjar vikur eftir álopini og teir møttu einum stórbýi í sorg. Við leivdirnar av teimum báðum tvíburatornunum hittu teir bæði sløkkiliðsmenn, yvirlivandi og syrgjandi fólk. Ferðin gongur eisini víðari til vesturstrondina til Kalifornia, og á vegnum hartil vitja teir norskar amerikumenn og ganga í fótasporum Elivis Presleys til suðurstatsbýin Memphis. Yvir ein hálv millión norðmenn vóru í biograf og sóu "Heftig og begeistret" um manskórið í Berlevåg. Nú NRK1 vísir annan partin, fylgja vit teimum á ferð til USA.